# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Brot á Stýrisskipanarlógina

**Í fíggjarlógini eru játtaðar 344 milliónir krónur, og verður farið út um játtanina er hetta ikki bert brot á fíggjarlógina, men eisini á Stýrisskipanarlógina, har tað týðiliga og greitt stendur, at eingin útreiðsla má verða goldin uttan at heimild er fyri henni í einari fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, sigur Bjørn á Heygum, advokatur**



*Sambært Bjørn á Heygum er tað brot á stýrisskipanarlógina, at samtykkja eina fíggjarlóg fyri síðani at seta kanningar í verk til tess vita, um tørvur er á størri játtan*

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonb@sosialurin.fo*

Sjúkrahússtjórin, Allan Skaalum, man helst hava kent seg rættiliga øðrkymlaðan, nú fíggjarlógin endaliga varð samtykt, og játtanin til Landssjúkrahúsið endaði á 344 milliónum og ikki á 374 milliónum, sum tørvurin annars er.

Landsstýrið hevur uggað við, at ein serfrøðingabólkur skal meta um tørvin hjá Landssjúkrahúsinum, og kemur hann fram til, at tørvurin er 374 milliónir krónur, verður sjúkrahúsinum veitt ein eykajáttan á 30 milliónir krónur.

Men hetta ber snøgt sagt ikki til, slær advokatur, sum var við til at smíða stýrisskipanarlógina, fast.

- Landssjúkrahúsið skal ikki halda seg til politiskar avtalur. Landssjúkrahúsið sum stovnur skal bara halda seg til galdandi lógir, og galdandi lógir eru til eina og hvørja tíð oman fyri politiskar avtalur, sigur Bjørn á Heygum við Rás2.

Hann sigur, at tað er beinleiðis ábyrgdarleyst, um landsstýrismaðurin og fyri tann skuld eisini sjúkrahússtjórin, rinda pening sum um ein játtan upp á 374 milliónir krónur fyriliggur, tá játtanin í veruleikanum er 344 milliónir.

- Tað má og skal fáa avleiðingar fyri avvarandi ábyrgdarpersónar, um teir ikki virða eina lóg, sum er samtykt á Føroya Løgtingi, sigur Bjørn á Heygum.

### Ikki »forventet fangst«

Bjørn á Heygum sigur, at tað ikki ber til at handla út frá »forventet fangst«.

-Tá játtanin á fíggjarlógini er 344 milliónir krónur, so má leiðslan beinanvegin taka hædd fyri hesum og handla út frá tí, at eingin eykajáttan fæst til vega. Tað er alt ov vandamikið og alt ov ótrygt at handla upp á »forventet fangst«, sigur Bjørn á Heygum.

Hann sigur víðari, at heldur Landssjúkrahúsið fram við rakstrinum sum um játtanin var 374 milliónir krónur, og hetta endar við einari meirnýtslu upp á 30 milliónir krónur, sum eingin eykajáttan fæst til, hava sjúkrahússtjórin og landsstýrismaðurin við brotið lógina.

- Tað er brot á bæði fíggjarlógina og stýrisskipanarlógina, um ein stovnur ikki virðir eina lóg, sum er samtykt í løgtinginum, sigur Bjørn á Heygum.

Hann heldur, at arbeiðshátturin hjá landsstýrinum í hesum máli er bæði skelkandi og virkar undirgravandi fyri rættarkensluna hjá fólki. Tað ber ikki til at samtykkja eina lóg og so samstundis signalisera, at henda sama lóg ikki nýtist at verða yvirhildin.

- Tí eru einastu ráð til Allan Skaalum, sjúkrahússtjóra, at fara at tillaga Landssjúkrahúsið til samtyktu játtanina beinanvegin, tí ger hann ikki tað, fer tað at fáa avleiðingar, bæði fyri hann sjálvan og hansara landsstýrismann, segði Bjørn á Heygum við Rás2.

